Samanlegging av loftmiðlum:

Fólkaflokkurin fremur hóttan í verki

Á tingsins røðarapalli mikudagin segði Annita á Fríðriksmørk, løgtingskvinna, at hon ikki ivast í, at Fólkaflokkurin, við at leggja loftmiðlarnar saman, hevur gjørt álvara av sínum hóttanum um, at bókin Skjót journalistin skuldi fáa avleiðingar fyri Sjónvarp Føroya

SAMANLEGGING

Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo

– Eg ivist ikki í, at fólkaflokkurin bert hevur bíðað eftir tí røttu løtuni at gera tað, sum teir ynsktu at gera, sigur løgtingskvinnan hjá Tjóðveldisflokkinum. Hon vísir á, at Óli Breckman undir seinasta valstríði segði, at bókin, Sknót journalistin, skuldi fáa avleiðingar fyri sjónvarpið.

Annita er heldur ikki í iva um, at samanleggingin av stovnunum er ikomin beint nú, tí at Sjónvarp Føroya ikki hevur verið so vælumtókt, orsakað av ætlanunum um at samsenda við TV2.

Løgtingskvinnan heldur tað somuleiðis vera undarligt, at sjónvarpsstjórin ikki slapp upp í part til nakað sum helst viðvíkjandi samanleggingini.

– Eisini er tað løgið, at landsstýrismaðurin mest sum yvir nátt kom við hesi ætlanini, uttan at nakar hevði hoyrt orð um tað áðrenn, heldur hon.

Samstundis vísir hon á, at landsstýrismaðurin enn ongar veruligar grundgevingar hevur givið fyri samanleggingini – ei heldur fyri hví sjónvarpsstjórin ikki fekk nakran sum helst leiklut í hesi ætlan.

Tískil ivast løgtingskvinnan hjá Tjóðveldisflokkinum onga løtu í, at Fólkaflokkurin harvið hevur framt sína hóttan fyrr í ár í verki.

Elton John Jam avlýst

Fríggjakvøldið skuldi Elton John Jam verða á skránni á Platform, men bólkurin fær ikki spælt vegna sjúku

Kim Hansen verður at hoyra á Platform leygarkvøldið

Ætlanin var, at nýggi føroyski kopibólkurin Elton John Jam skuldi spæla á Platform fríggjakvøldið. Men hetta verður av ongum, tí ein av tónleikarunum í bólkinum er sjúkur, og so fá teir ikki spælt.

Elton John Jam hevur havt tvær framførslu áður, og tær eydnaðust báðar sera væl.

Sangarin Kim Hansen hevur Elton John sum eina av sínum stóru fyrimyndum, og hann er eisini ein framúr tulkari av sangum hjá Elton John. Nú hava hann og restin av manningini í Showmenn vant sangir hjá Elton John, sum teir kunnu spæla, sum vóru tað teirra egnu sangir.

Talan er um góðar og kendar sangir hjá tí frálíka bretska tónasmiðinum, men fólk mugu bíða eitt sindur fyri at hoyra teir spæla aftur.

Av tí at Elton John Jam ikki kann spæla verður diskotek á Platform fríggjakvøldið.

Leygarkvøldið verður tó møguleiki at hoyra live tónleik, tí tá fer ein bólkur við Kim Hansen á odda at spæla til dans.

Grind for østen

Fylgissveinagrindin heldur beina kós norðureysturyvir. Hon er farin lagt út um føroyska sjómarkið

GRINDIN



Fylgisveinagrindin, sum var ein túr á sandinum í Sandavági tann 25 august, hevur hesa góðu vikuna, síðan sendara vórðu settir á nakrar av hvalunum, lagt nógvar fjórðingar afturum. Rættiliga nógvar.

Tað eru longu nakrir dagar síðan, hon fór úr føroyskum sjóoki, og er nú á veg norðureystur yvir og tykist ætla sær nærkast norsku strondini.

Fylgisveinamyndirnar vísa, at hon er farin eystur um stóra dýpið í Norska Havinum og er á veg inn aftur móti grynri vatni norsku megin.

ej

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg

Hvør fjøl á flot leygardagin

STUÐULSFELAGIÐ "DRAGIN"

Um viðrar, verður árliga fiskikappingin í Norðoyggjum leygardagin 11. september.

Næsta vikuskiftið verður ein rættiliga góð streymloysa, og tí hevur Stuðulsfelagið fyri skúlaskipið M/S Dragin avgjørt at skipa fyri tí árligu fiskikappingini, sum eer fyri allar Norðoyggjar. so er bert at vóna at veðrið verður til vildar.

Vinnarar seinasta ár:

Í fjør var tað báturin "Saga" við Eskild Hansen og Jóannes Joensen, sum vóru bestir, og fingu teir steyp til ognar eins og ferðasteyp.

Næstbestur bátur var "Fliðan" við Elmar og Palla Simonsen í Hvannasundi, og triðbestur var "Jenny" við Per Jensen og Richard Johannesen.

Luttøkutreytir

Frá kl. 7.30 fáa allir bátar, sum fara av Vánni í Klaksvík, luttøkuskjøl umborð á "Draganum". Luttakarar á Borðoyavík og Árnafirði fáa eisini luttøkuskjal umborð á "Draganum", men í Hvannasundi og Norðdepli fæst luttøkuskjalið við Frostvirkið, og á viðareiði fæst tað niðri á Eiðsvík. Luttøkugjaldið er 20 kr. pr. mann.

Ikki loyvt at fara einsamallur

Av trygdarávum er ikki loyvt at fara einsamallur, tað skulu minst tveir mans við hvørjum báti. Bátarnir kunnu fara frá landi kl. 8, og tað eer bert loyvt at nýta snøri, snellu ella tráðu sum veiðureiðskap. Tað er ikki loyvt at fiska við aliringarnar. Seiður telur ikki við í vektini. allir bátar skulu verða aftur á landi í seinasta lagi kl. 17.

Fiskauppboðssøla

Kl. 18 verður fiskauppboðssøla, har fólk kunnu keypa sær at kóka. Fiskurin verður lagdur upp og vigaður við bátabrúgvarnar við Nólsoyar Páll gøtu. Frá kl. 18-19 verður fiskauppboðssøla við bátabrúgvarnar, so har verða góðir møguleikar hjá fólki at keypa sær nakrar greipur av smáfiski til at hanga upp.

Teir, sum hava luttikið í fiskikappingini, fáa kaffi og pannikøkur umborð á "Draganum".

Besti báturin

Tann bátur, sum hevur stórstu veiðu pr. mann, veerður vinnari og fáa teir ferðasteyp. Manningarnar á trimum teimum bestu bátunum fáa steyp til ognar. Eisini verður steyp latið til tann, sum hevur fingið tann stórsta fiskin.

Steypini til fiskikappingina hevur Norðoya Sparikassi givið.

Nú er at rigga til

Fyrireikararnir vóna, at nógvir mans nú fara at rigga til, so vit fáa eina spennandi fiskikapping. Í Klaksvík liggja nógvir bátar við bátabrúgvarnar, og her er ein góður kjansur hjá monnum at fara á flot og fáa ein hugnaligan dag saman - og spennandi verður hvørjir verða fiskikongar í ár.

Fiskikappingardansur í Skálanum kl. 11'

Til fiskikappingardansin í ár spæla "Julianne-boys", sum eru kendir um alt landið fyri teirra frálíka góða dansitónleik. Fyrireikararnir heita á fólk um at koma í dans áðrenn miðnátt, tí so fáa tey meira burturúr, og dansistemningurin verður betri.

Tekning til dansin á tlf. 456661 og 456282.

Peningurin frá fiskikappingini og dansinum fer óskerdur til skúlaskipið Dragin.

Nútímans útbúgving

TÍÐINDASKRIV FRÁ SKEIÐSDEPLINUM

Eftir- og viðariútbúgving á Føroya Handilsskúla og Tekniska skúla í Torshavn

Nú ber aftur til at tekna seg til vælumtóktu GLÚ útbúgvingina, sum Skeiðsdepilin bjóðar fram. GLÚ, sum stendur fyri Grundleggjandi Leiðaraútbúgving er ein eftirútbúgving í leiðslu. Útbúgvingin vendir sær til allar verandi og komandi leiðarar, sum ynskja sær eina holla leiðslufakliga grundútbúgving. Høvuðsdenturin í útbúgvingini liggur á tí, sum kann kallast millumleiðaraøkið.

Grundleggjandi Leiðaraútbúgvingin er eitt svar uppá tær ovurstóru avbjóðingar, sum ein broyttur arbeiðsmarknaður hevur sett til leiðsluyrki. Tað at leiða eina fyritøku setir í dag heilt øðrvísi krav til leiðsluna enn fyri bert fáum árum síðani.

Fleiri orsøkir eru til, at arbeiðsmarknaðurin er broyttur. Eitt nú er útbúgvingarmynstrið broytt, soleiðis at fólk í dag leggja størri dent á støðugt at menna seg fakliga, enn tey áður hava gjørt. Eisini framleiðslumynstrið er broytt almikið seinastu árini, fyrst og fremst orsaka av KT og alheimsgerð. Vanlig vørframleiðsla minkar støðugt í okkara parti av heiminum. Í staðin fyri at framleiða vørur fara fyritøkur á okkara leiðum meira og meira yvir til at framleiða og selja vitan. Hendan broyting ávirkar allan arbeiðsmarknaðin, eisini tann partin, sum framvegis fæst við vøruframleiðslu.

Broytti arbeiðsmarknaðurin hevur við sær, at ein heilt øðrvísi kapping hevur tikið seg upp um tey dugnaligastu starvsfólkini. Sum nevnt krevja alt fleiri fólk í dag møguleika til støðugt at menna seg fakliga. Hetta er neyðugt hjá tí einstaka, skal hann ikki siglast afturút í skjótu tøkniligu menningini, sum vit uppliva í dag. Kappingin um dugnaligastu starvsfólkini kann tískil ikki vinnast bert við at bjóða eina høga løn.

Tær fyritøkur, sum standa seg væl í kappingini um dugnalig starvsfólk, eru hinvegin tær, sum megna at sameina menningartørvin hjá tí einstaka starvsfólkinum við menningartørvin hjá fyritøkuni. Einstaka starvsfólki verður soleiðis ein íløga hjá fyritøkuni, sum støðugt má røkjast fyri at løna seg. Hetta er tað, sum nútímans leiðsla snýr seg um.

Við GLÚ bjóðar Skeiðsdepilin fram eina útbúgving, sum er gjørd við tí fyri eyga at geva luttakarunum ein grundleggjandi førleika í nútímans leiðslu. Útbúgvingin byggir á ta leiðslufilosofiina, sum nevnist Human Ressource Management ella HRM. Hetta er ein filosofi, sum leggur dent á, at fyritøkan fær fulla nyttu burturúr teimum førleikum, sum einstaka starvsfólki hevur. Hetta skal koma bæði starvsfólki og fyritøku til góða. Avgerandi fyri at hetta skal eydnast, er ein dygdargóð og málrætta leiðsla. Ein slík leiðsla fæst best um leiðarar á øllum stigum í fyritøkuni fáa í minsta lagi eina grundútbúgving í leiðslu. Og tað er hesa grundútbúgving, sum Skeiðsdepilin nú, fyri tríðju ferð, bjóðar fram.

GLÚ byrjar aftur í oktober og til ber at tekna seg til útbúgvingina longu nú á Skeiðsdeplinum. Undirvísingin er skipað sum dagskeið, tilsamans 12 dagar í eitt hálvt ár. Fyritøkur og stovnar, sum ynskja nærri kunning um útbúgvingina, kunnu venda sær til Skeiðsdepilin, sum bjóðar sær til at skipa fyri kunnandi tiltøkum úti hjá fyritøkunum og stovnunum sjálvum. Einstaklingar eru sjálvandi eisini vælkomnir at venda sær til Skeiðsdepilin, um teir ynskja at vit meira um GLÚ.

Á heimasíðuni www.skeidsdepilin.fo er innihaldslýsing og tíðarskeið, sama fæst eisini við at ringja tel. 318813.

Nýggi faldarin hjá Skeiðsdeplinum við útbúgving og skeiðum fyri 2004/2005 kann bíleggjast á heimasíðuni www.skeidsdepilin.fo ella við at ringja tel. 318813.